# Leikvallarreglur fyri UEFA European Women's Under-17 Championship 2025

## 1. Virkisøki

Hesar leikvallarreglur, og allar mannagongdir og reglur viðvíkjandi heilsutiltøkum, eru galdandi fyri allar atgongumerki- og/ella akkrediteringshaldarar, sum fara inn á leikvallarøkið, ið verður nýtt í sambandi við EM-kappingina fyri kvinnur undir 17 ár 2025 (UEFA European Women´s Under-17 Championship 2025), sum er átt av Union of European Football Associations (hereftir "UEFA") og skipað av EM-kappingini fyri kvinnur undir 17 ár 2025, vertslandi, nevniliga Fótbóltssambandi Føroya (stutt heiti FSF) (hereftir "vertslandið").

Leikvøllurin, sum víst til í hesum leikvallarreglum, fevnir um øll øki innan fyri leikvøllin og økir nærhendis har EM-kappingin fyri kvinnur undir 17 ár 2025 ætlandi verður leiktur, verður leiktur ella er leiktur, og sum einans eru atkomulig við dystaratgongumerki (hereftir "atgongumerki") og/ella akkreditering til kvinnu EM-kappingina undir 17 ár 2025, íroknað allar inngongdir og útgongdir.

Hesar leikvallarreglur og listin yvir bannaðar lutir skulu, fyri tíðarskeiðið tá ið eitt atgongumerki ella akkreditering krevst fyri at fara inn á leikvøllin, (sambært galdandi lógum og reglugerðum og uttan so at UEFA boðar frá øðrum) koma í staðin fyri leikvallarreglurnar hjá leikvøllinum, sum stýra øðrum dystum og/ella tiltøkum, ið verða spæld og/ella hildin á leikvøllinum í øðrum tíðarskeiðum.

Leikvallarreglurnar skulu vera tøkar á heimasíðuni hjá vertslandinum á https://www.fsf.fo/wu17euro2025/, og við inngongdirnar til og inni á leikvøllinum alla tíðina meðan leikvallarreglurnar eru í gildi.

Umframt hesar leikvallarreglur skulu øll fylgja atferðarreglum fyri áskoðarar ella atferðarreglum fyri akkrediteraðar persónar (sum eru galdandi) sum eru settar í verk fyri EM-kappingina fyri kvinnur undir 17 ár 2025.

## 2. Atgongd

2.1. Atgongd til leikvøllin verður einans loyvd við framvísing av gildugum atgongumerki og/ella akkreditering fyri hvønn einstakan persón, uttan mun til aldur. Atgongumerkið og/ella akkrediteringin má vísast fram til eftirlit við inngongdini til, og inni á, leikvøllinum um ein persónur útnevndur av UEFA og/ella vertslandinum, ella eitt løgreglufólk, biður um tað. Um biðið verður um tað, má samleikaprógv vísast í formi av einum almennum skjali. Um viðkomandi ikki vil samstarva, hevur hetta við sær, at atgongd til leikvøllin verður noktað ella burturvísing frá leikvøllinum.

2.2. Gildi og nýtsluføri av atgongumerkjum og akkrediteringum verða ásett sambært viðkomandi treytum og umstøðum fyri atgongumerki og akkreditering til EM-kappingina fyri kvinnur undir 17 ár 2025. Atgongumerki- og akkrediteringshaldarar kunnu einans fara inn á leikvøllin við einum atgongumerki ella akkreditering, sum er keypt/veitt og nýtt í samsvari við slíkar treytir og umstøður. Atgongumerki og akkrediteringar, sum eru keypt frá óheimilaðum keldum, eru ógildug.

2.3. Atgongumerkishaldarar undir 12 ára aldri fáa einans loyvi at fara inn á leikvøllin við einum fylgjandi vaksnum, sum hevur ábyrgd av teimum. Tann fylgjandi vaksni má eisini hava eitt gildugt atgongumerki.

2.4. Rørslutarnaðir persónar skulu kunna røkka atkomulig øki gjøgnum inngongdir, sum eru ætlaðar til hetta endamál, við at vísa eitt gildugt atgongumerki fyri rørslutarnaðar persónar. Einhvør fylgjandi persónur má eisini hava eitt gildugt atgongumerki. Prógv um rørslutarnið má vísast um ein persónur útnevndur av UEFA og/ella vertslandinum biður um tað.

2.5. Atgongumerkishaldarar fáa loyvi at fara inn á leikvøllin frá tí, at portrini lata upp (tíðin fyri hetta skal vera víst á atgongumerkinum). UEFA og vertslandið skulu avgera, við støði í viðurskiftum so sum trygd og vernd, um portrini (og hvørji portur) skulu latast aftur eftir dystarbyrjan og, um so er, nær. Hóast UEFA og vertslandið skulu taka rímilig stig fyri at tryggja, at portrini verða verandi opin so leingi sum gjørligt eftir dystarbyrjan, eiga atgongumerkishaldarar at vera varir við, at portrini til leikvøllin kunnu verða latin aftur um teir koma til leikvøllin eftir dystarbyrjan, og at hóast UEFA og vertslandið skulu brúka sínar rímuligu royndir at veita atgongd til atgongumerkishaldarar í slíkum umstøðum, kann atgongd til leikvøllin vera ógjørlig um atgongumerkishaldarar koma ov seint til leikvøllin og portrini longu eru latin aftur.

2.6. Koyring og parkering av akførum við leikvøllin er einans loyvd við serligum loyvi frá UEFA og/ella vertslandinum.

## 3. Persónlig eftirkanning

3.1. Øll fólk, sum fara inn á leikvøllin, hava skyldu at vísa og, um biðið verður um tað, lata sítt atgongumerki og/ella akkreditering til eftirkanningar til ein persón, sum er útnevndur av UEFA, vertslandinum og/ella leikvøllinum.

3.2. Einhvør persónur útnevndur av UEFA, vertslandinum og/ella leikvøllinum, hevur rætt til at kanna – undir nýtslu av tøkniligum hjálpartólum – um persónar umboða ein váða fyri møguligari órógvan av almennum skili, serliga av teirri orsøk, at teir hava nýtt rúsdrekka ella rúsevni ella eru í ognarhaldi av vápnum ella øðrum bannaðum lutum. Einhvør skikkaður persónur útnevndur av UEFA og/ella vertslandinum, hevur rætt til at kanna ein persóns klæðir og aðrar lutir í teirra ognarhaldi.

3.3. Bannaðir lutir verða tiknir frá einum persóni útnevndum av UEFA, vertslandinum og/ella leikvøllinum og mugu latast, tá og um møguligt, í taskugoymsluni av eigaranum. Persónar útnevndir av UEFA, vertslandinum og/ella leikvøllinum hava rætt til at nokta at goyma ávísar lutir í taskugoymsluni.

3.4. Einhvør persónur, sum noktar at akta leikvallarreglurnar ella sum umboðar ein trygdar- ella verndarvanda, verður burturvístur og noktaður atgongd til leikvøllin, uttan skerdan rætt til aðrar gerðir, sum kunnu verða tiknar ímóti slíkum persóni.

3.5. Einhvør persónur, sum ger óheimilaða nýtslu av einum atgongumerki ella sum er álagdur eitt galdandi leikvallarbann, verður noktaður atgongd til leikvøllin og má beinanvegin lata sítt atgongumerki aftur til UEFA og/ella vertslandið (sum boðað), samsvarandi atgongumerkistreytum og -umstøðum. Líknandi reglur galda fyri einhvørja nýtslu av akkreditering, sum ikki er í samsvari við akkrediteringstreytir og -umstøður.

## 4. Atferð inni á leikvøllinum

4.1. Øll fólk, sum fara inn á leikvøllin, skulu:

a) fylgja øllum mannagongdum og reglum sum eru galdandi viðvíkjandi heilsutiltøkum;

b) uppføra seg á ein slíkan hátt, at tey ikki skaða, særa, seta í vanda ella óneyðuga forða ella órógva onnur, ella volda nakran skaða;

c) fylgja leiðbeiningum frá persónum útnevndum av UEFA, vertslandinum og/ella leikvøllinum, ella løgregluni, sløkkiliðnum ella aðrari bjargingartænastu;

d) sita á tillutaðum sessi sum víst á teirra atgongumerki og nýta hóskandi atgonguleiðir. Ein persónur vil vera noyddur at sita á einum øðrum sessi enn tí, sum er víst á teirra atgongumerki, av trygdar ella fyriskipanar/rakstrarligum orsøkum, um ein persónur útnevndur av UEFA, vertslandinum og/ella leikvøllinum, ella eitt løgreglufólk biður um tað.

4.2. Tað er strangliga bannað at:

a) kasta lutir frá áskoðaraplássunum út á vøllin og
b) fara inn á vøllin frá áskoðaraplássunum

og einhvør persónur, sum brýtur hesar ásetingar, kann verða álagdur rættarsókn.

4.3. Um ein persónur verður varugur við skaða voldnan á ogn, ella óhapp, eigur slíkur persónur beinanvegin at taka stig til at kunna ein persón útnevndan av UEFA, vertslandinum og/ella leikvøllinum.

4.4. Atgongd verður strangt avmarkað til tað, sum haldarin av atgongumerkinum, akkreditering og/ella, um viðkomandi, eyka atgongutóli, hevur rætt til.

4.5. Serlig krøv kunnu verða sett fyri at fyribyrgja, minka ella burturbeina vanda fyri lívi, heilsu ella ogn. Leiðbeiningar givnar av einum persóni útnevndum av UEFA, vertslandinum og/ella leikvøllinum mugu fylgjast, og um ikki samstarvað verður, kann tað hava við sær burturvísing frá leikvøllinum.

4.6. Rusk og tómur pakningur mugu leggjast í ruskspannirnar og íløtini, sum eru tøk á leikvøllinum. Allar fyriskipanir fyri burturbeining av ruski mugu virðast.

4.7. Royking – íroknað nýtsla av e-sigarettum og upphitaðum tubbaksúrdráttum – er bannað á leikvøllinum, uttan í, um loyvt er sambært galdandi lógum, innan ávís roykiøkir.

## 5. Ljóð- og myndaupptøkur og sending

5.1. Øll fólk, sum luttaka í EM-kappingini fyri kvinnur undir 17 ár 2025, góðtaka, at teirra rødd, mynd og líkleiki upptikið í teirra tíð á leikvøllinum ("upptøkur") kunnu verða nýtt, ókeypis, í einari og hvørjari mynd, ljóði og audiovisuellum tilfari í sambandi við EM-kappingina fyri kvinnur undir 17 ár

2025, annaðhvørt samstundis ella seinni. UEFA og vertslandið ella triðjapartar, sum teir hava í starvi ella annars heimilað í hvørjum føri (t.d. sjónvarping, fjølmiðlar), gera upptøkur við tí endamáli og við grundarlagi í teirra lógliga áhuga av almennum fráboðanum og marknaðarføring av EM-kappingini fyri kvinnur undir 17 ár 2025 samsvarandi Art. 6 stk. 1 (1) lit. f í GDPR. Upptøkur kunnu verða viðgjørdar, gagnnýttar og alment endurgivnar av UEFA og vertslandinum eins væl og triðjapørtum heimilaðir av teimum í hvørjum føri (t.d. sjónvarping, fjølmiðlar) innan karmarnar av sama lógliga áhuga samsvarandi Art. 6 stk. 1 (1) lit. f í GDPR.

5.2. Persónar, sum luttaka í EM-kappingini fyri kvinnur undir 17 ár 2025, skulu ikki savna, upptaka, nýta ella útbreiða nakað ljóð, mynd, upptøku ella framstilling av leikvøllinum ella dystinum (íroknað úrslit, hagtøl, upplýsingar ella onnur dáta um dystin, í heild ella partvís) á internetinum, útvarpi, sjónvarpi ella nakrari aðrari núverandi ella framtíðar miðli – ella hjálpa øðrum persónum at gera tað – uttan til privata nýtslu. Fyri at sleppa undan iva, hava UEFA ella aðrir heimilaðir triðjapartar rætt til at strika, ella fáa strikað, allar myndir sendar ella alment vístar í brot við hesa áseting, og at føra fram eitthvørt krav móti tí ábyrgdarfulla persóninum (savnan, upptøku, útbreiðslu sum lýst omanfyri) í eini rættarligari ella uttan-rættarligari tilgongd. Afturat hesum, við at útbreiða ljóð, mynd, upptøku ella framstilling í brot við áðurnevndu ásetingar í hesi grein, skulu allir persónar veita UEFA tann óafturkalliliga rættin at nýta, endurgeva og handilsliga gagnnýta slíkar útbreiðslur, íroknað tey intellektuellu ognarrættindini, um nøkur, í slíkum útbreiðslum. Allir persónar samtykkja harumframt (um og tá UEFA krevur tað) beinanvegin at undirskriva øll skjøl og gera allar neyðugar gerðir fyri at flyta rættin, heitið og áhugan í slíkum rættindum til UEFA ótreytað og frían av øllum heftni og øðrum byrðum.

## 6. Bannaðir lutir og atferð

6.1. Fylgjandi lutir mugu ikki takast við inn á leikvøllin, uttan so at tað er góðkent (tá og um viðkomandi) av UEFA og/ella vertslandinum:

a) ongar taskur størri enn A4 (210 mm x 297 mm x 210 mm);

b) vápn av nøkrum slag ella nakað, sum kundi verið tillaga til nýtslu sum eitt vápn ella skjótilutur, (íroknað spjótregnsløg). Fyri at sleppa undan iva, verður ein flytførur fartelefon-løðari, sum er av líknandi stødd ella minni enn telefonin sjálv, ikki mettur sum ein skjótilutur og verður loyvdur inni á leikvøllinum;

c) fløskur, krukkur ella dósir av nøkrum slag, eins væl og aðrir lutir gjørdir úr plasti, glasi ella øðrum óstøðugum tilfari, uttan lutir, sum eru kravdir orsakað av hóskandi próvførdum heilsuligum grundum;

d) fyrverkarí, bluss, roykuligt pulvur, roykbumbur ella annað pyrotekniskt tilfar;

e) gass-spreydósir, etsandi/eldførir løgir, litir, ella íløt, sum innihalda evni, ið eru skaðilig fyri heilsuna ella sera eldførir;

f) andlitsfjalingar, íroknað hjálmar, balaklavur og skígrindir;

g) lasarvísarar;

h) dronur;

i) matur av einhvørjum slagi, uttan lutir, sum eru kravdir orsakað av hóskandi próvførdum heilsuligum grundum;

j) alkohol, rúsevni ella onnur ørvandi ella vandamikil evni, uttan evni, sum eru kravd orsakað av hóskandi próvførdum heilsuligum grundum;

k) nakað háðandi, rasistiskt, fremmandfíggindakennt, kynsavskeivandi, átrúnaðarligt, politiskt ella annað ólógligt/bannað tilfar, íroknað mismunandi propagandatilfar;

l) marknaðarførings-, handilslutir ella tilfar, íroknað bannarar, skelti, tekin og flogbløð;

m) boygiligar flaggstengur, ið eru longri enn 1 (ein) metur og 1 (ein) cm í tvørmáti;

n) bannalútur ella fløgg størri enn 2,0 (tveir) x 1,5 (ein og ein hálvur) metrar. Minni fløgg og bannarar kunnu vera loyvd, treytað av, at tey eru gjørd úr tilfari, sum verður mett at vera ikki-eldført og sum heldur krøvini í lokalu lóggávuni. Allir bannarar ella fløgg størri enn 2,0 (tveir) x 1,5 (ein og ein hálvur) metrar eru einans loyvd við eini skrivligari umbøn, sum er váttað av UEFA og/ella vertslandinum;

o) elektroniskt, mekaniskt ella manuelt stýrd ljóð-útgevandi tól so sum megafonir;

p) professionell kamera og videokamera ella annað professionelt ljóð- ella video-upptøkutól, við tí fatan, at kamera, videokamera og annað ljóð- ella video-upptøkutól kunnu takast við inn á leikvøllin til privata nýtslu og skulu verða góðtikin sum slík av UEFA og/ella vertslandinum;

q) øll tól, sum verða nýtt til endamál at senda ella útbreiða nakað innihald í brot við Grein 5.2; og

r) djór, uttan blindafylgidjór og/ella hjálpardjór (treytað av, at slík blindafylgidjór og/ella hjálpardjór eru loyvd at koma inn á leikvøllin sambært galdandi lógum).

Um ivi er um nakran lut, sum er tikin við inn á leikvøllin, hevur viðkomandi persónur útnevndur av UEFA, vertslandinum og/ella leikvøllinum ábyrgd at avgera, hvørjir lutir eru bannaðir ella loyvdir samsvarandi leikvallareglunum.

6.2. Tað er strangt forboðið at gera nakað av fylgjandi inni á leikvøllinum:

a) kasta lutir ella løgir av nøkrum slag, serliga mótvegis einum øðrum persóni ella mótvegis økinum kring vøllin ella vøllin sjálvan;

b) byrja ein eld, ella lata av ella skjóta fyrverkarí, bluss ella aðrar pyrotekniskar lutir;

c) úttrykka ella útbreiða háðandi, rasistisk, fremmandfíggindakend, kynsavskeivandi, átrúnaðarlig, politisk ella onnur ólóglig/bannað boð, serliga mismunandi propagandaboð;

d) føra seg fram á ein hátt, sum kann verða týtt av øðrum sum vandamikið, provokerandi, hóttandi, mismunandi ella sárandi;

e) selja vørur ella atgongumerki, útbreiða tilfar (íroknað prentað tilfar) ella lutir, halda innsavningar ella útinna aðrar marknaðarførings- ella handilsligt virksemi uttan skrivligt loyvi frammanundan frá UEFA og/ella vertslandinum, um viðkomandi;

f) kliva upp á, ella yvir, bygningar og innleggingar, sum ikki greitt eru ætlaðar til hetta endamál;

g) skriva, mála á, ella festa nakað á bygningar, innleggingar ella gøtur;

h) fara á vesið aðrastaðni enn á vesinum, ella dálka leikvøllin við at burturbeina lutir so sum burturkast, pakningur ella tóm íløt;

i) standa á sessum í áskoðaraøkjum;

j) dulbúnast ella fjalast (serliga andlitið) á ein hátt, sum forðar atkennning;

k) uttan annars at verða heimilað av UEFA og/ella vertslandinum, fáa atgongd til øki (t.d. funktiónsrúm ella VIP- og miðlaøki), sum eru afturlatin fyri almenninginum ella har atgongd er avmarkað til haldarar av einum serligum atgongumerki, akkreditering og/ella, tá viðkomandi, eyka atgongutóli, um persónurin í spurninginum ikki hevur rætt til atgongd til slík øki;

l) uttan annars at verða heimilað av UEFA og/ella vertslandinum, avmarka ella sleingja í økjum opin fyri ferðslu, gongdum og vegum, inngongdum og útgongdum til vitjanaøki og tilbúgvingarútgongdum;

m) uttan annars at verða heimilað av UEFA og/ella vertslandinum, fara inn á vøllin ella økið rundanum vøllin og

n) einhvør onnur atferð, sum verður mett sum ótrygg, og sum er bannað av trygdarstarvsfólkunum á leikvøllinum.

Omanfyristandandi listi er ikki úttømandi, og øll fólk skulu fylgja leiðbeiningum frá trygdar- og verndastarvsfólkum á leikvøllinum viðvíkjandi teirra atferð.

## 7. Brot á Leikvallarreglurnar

Samsvarandi galdandi lógum, kann eitthvørt brot á leikvallarreglurnar hava við sær, at fylgjandi revsingar verða álagdir:

a) burturvísing frá leikvøllinum og ein møgulig frágreiðing, sum verður latin til løgreglu;

b) bannførið av bannaðum leikvallarluttakarum frá leikvøllinum fyri part ella alla tíðina av EM-kappingini fyri kvinnur undir 17 ár 2025, samsvarandi akkrediteringstreytum og -umstøðum ella atgongumerkistreytum og -umstøðum (sum viðkomandi);

c) avlýsing og ógildan, uttan endurgjald, av atgongumerkinum og øllum øðrum atgongumerkjum, sum eru keypt ella fingin til vega av tí brotfulla persóninum til EM-kappingina fyri kvinnur undir 17 ár 2025, samsvarandi atgongumerkistreytum og -umstøðum;

d) veiting, samsvarandi galdandi lógum, av tí brotfulla persónsins persónligu upplýsingum til viðkomandi tjóðar fótbóltssambond og/ella løgreglu, so at hóskandi tiltøk kunnu verða tikin (t.d. tjóðar leikvallarbann);

e) íverksetan av rættarligum málum av UEFA og/ella vertslandinum, ella øðrum heimilaðum persónum ella eindum; og/ella

f) revsingar ella rættarráð í samsvari við galdandi lógir.

UEFA og/ella vertslandið varðveita rættin at fylgja øðrum rættarligum ráðum eftir egnum tykki.

## 8. Videoeftirlit

Fyri at tryggja trygd hjá almenninginum, er leikvøllurin útgjørdur við eini videoeftirlitsskipan stýrd av leikvøllinum, vertslandinum, løgreglufólkum ella privatum trygdarfólkum, har myndir frá hesum kunnu verða nýtt í sambandi við rættarlig mál. Videoeftirlit fevnir um nýtslu av kropsbornum kameraum, sum eisini taka upp ljóð. Ein rættur til atgongd er veittur í samsvari við lokala lóg.

## 9. Ábyrgd

Innan fyri mørk áløgd av galdandi lógum, viðurkenna persónar, sum koma inn á leikvøllin, at teir gera tað upp á egna ábyrgd og at teir kunnu verða ábyrgdarførir fyri skaða ella miss, sum stavar frá teirra gerðum á leikvøllinum.

## 10. Sjálvstøðugar greinar og broytingar

10.1. Um nakrar ásetingar í hesum leikvallareglum verða lýstar sum ógildaðar, virkisleysar ella óbrúkiligar av kompetentum dómstóli, skal restin av leikvallarreglunum verða verandi í gildi, sum um hesar ógildugu, virkisleysu ella óbrúkiligu ásetingar ikki høvdu verið til.

10.2. UEFA og vertslandið varðveita rættin at gera rímiligar broytingar til leikvallareglurnar frá tíð til aðra, og tann seinasta og virkna útgávan av hesum skal vera tøk á heimasíðuni hjá vertslandinum á https://www.fsf.fo/wu17euro2025/.

## 11. Upprunatekstur

Leikvallarreglurnar eru skrivaðar á enskum og týddar til málið í vertslandinum. Um andsøgn er millum tekstirnar, skal tann enski teksturin vera galdandi.

## 12. Galdandi lóg og løgdømi

12.1. Leikvallarreglurnar skulu vera stýrdar av og tulkaðar í samsvari við lógirnar í Føroyum.

12.2. Allar trætur, sum koma frá ella eru tengdar at leikvallareglunum, skulu verða lagdar fram fyri tann kompetenta rættin í Tórshavn, Føroyum.

**Fylgiskjal**

**ROYKING ER BANNAÐ**

# PROHIBITED ITEMS

Non-exhaustive list of prohibited items


Bags larger than A4


No smoking


Cane umbrellas of any kind



Laser pointers


Bottles*, jugs, cans, glass, etc.


Pyrotechnics


Face covering


Alcoholic drinks and drugs*



Racist, xenophobic, political & religious propaganda materials


Flagpoles more than 1m in length & 1cm in diameter


Flags larger than 2.0m x 1.5m (6.5' x 5.0')


Drones


Professional cameras or video cameras


Weapons, explosives, knives, or anything that could be adapted for use as a weapon



Promotional or commercial objects or materials


Mechanical or electronic sound-emitting devices, such as megaphones


Aerosol sprays

* Except on duly evidenced medical grounds